# ítróttur

Nr. 229 • týsdagur • 2. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Jákup aftur í KÍ

**Landsiðsmálverjin tykist nú enda yrkisleiðina innan fótbóltin, og frá nýggjárinum at rokna veðrur hann leysur av skotska ævintýrinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er einki at ivast í, at ein av teimum monnum, sum klaksvíkingar hava verið heilt stoltir av, er Jákup Mikkelsen. Seinastu nógvu árini hevur landsliðsmálverjin roynt seg sum yrkisleikari uttanlands, og eitt nú var hann partur av liðnum hjá Herfølge, sum púra óvæntað streyk avstað við danska meistaraheitinum í 2000.

Síðani hevur verið eitt sindur misjavnt, hvussu hevur gingist hjá Jákupi.



Meistaraheitið varð árið eftir býtt um við niðurflyting, og eitt lovandi skifti til norska Molde endaði við einum plássi á beinkinum, tá felagið eisini keypti ein svenskan málverja. Seinasta hálva árið hevur tað tó verið í Skotlandi, at Jákup hevur roynt seg, men heldur ikki her gekst nakað serligt.

Felag hansara, Partick Thistle, eigur enn fyrsta sigurin til góðar, og seinastu nógvu umførini hevur føroyski landsliðsmálverjin bert verið á beinkinum, og tað er ikki júst tað, sum ein spælari hevur besta hugin til.

Tí hevur Jákup eisini spurt seg fyri, hvørt tað er møguligt at verða loystur úr sáttmálanum, og við Norðlýsið sigur málverjin, at hetta hevur hann fingið skriftligt lyfti um.

At tað gjørdist KÍ, sum verður nýggja felag hansara, man neyvan koma so óvart á tey flestu, men tað var tó um reppið, at talan gjørdist um annað felag. Í øllum førum varð undan vikuskiftinum sagt, at B36 stóðu klárir við tí heilt stóra kekkheftinum. Hvørt hald varð í hesum, ella um Jákup bara valdi kenslurnr fram um peng-arnar, er ikki staðfest, men í øllum førum tykist víst, at tað verður í KÍ, at Jákup nú fer at royna seg.

– Vit hava ikki gjørt nakran endaligan sáttmála, men hava avtalað at forhandla smálutirnar upp á pláss, so skjótt sum eg komi heim, sigur Jákup Mikkelsen við Norðlýsið á netinum, og tað líkist í øllum førum eini staðfesting av, at málverjin nú setir kós heimaftur.

## Jólapostur 2003

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsi í Tórshavn ikki seinni enn:

| | Flogpostur | | Skipspostur | |
|---|---|---|---|---|
| | Brøv | Pakkar | Brøv | Pakkar |
| Bretland | 16.12 | 15.12 | 04.12 | 04.12 |
| Danmørk | 18.12 | 18.12 | 11.12 | 11.12 |
| Finnland | 15.12 | 12.12 | 04.12 | 04.12 |
| Grønland, Nuuk | 17.12 | 16.12 | 27.11 | 27.11 |
| Ísland | 18.12 | 18.12 | senda ikki við skipi | |
| Noreg | 18.12 | 16.12* | 04.12 | 04.12 |
| Svøríki | 18.12 | 18.12 | 11.12 | 04.12 |

** Pakkar til postnr. 8000-9999 í Noregi tó 11.12.*
*Freistirnar eru eisini at síggja á www.postur.fo Upplýsingar um seinastu freistir til onnur lond eru at fáa á størstu posthúsunum.* ***Tað er umráðandi fyri skjóta tollavgreiðslu í móttakaralondunum, at tollsøgnin er týðilig og fullfíggjað.***

Veðurlíkindi kunnu gera, at postur verður seinkaður
- tí verður rátt til at senda hann í góðari tíð.

### Innanlands

Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi **fríggjadagin 19. desember.**

### Tilskriftarleysar sendingar til útberingar fyri jól

Seinasta freist fyri innlating:
Til útberingar fyri vanligt postgjald: mikudagin 10. desember kl. 12.00.
Til útberingar fyri hægri postgjald: fríggjadagin 12. desember kl. 12.00.

16. - 17. desember verða tilskriftarleysar sendingar bert bornar út, um hægri postgjald verður goldið. Frá og við 15. desember fram til jóla verður ikki tikið ímóti tilskriftarleysum sendingum.

**Hækkaða postgjaldið** fyri sendingar til útberingar 16. - 17. desember:
Fyri sendingar upp í 100 g: 60 oyru eyka fyri hvørja.
Fyri sendingar yvir 100 g: 80 oyru eyka fyri hvørja.

**Postverk Føroya ynskir øllum viðskiftafólkum eini gleðilig jól og eitt happadrúgt nýggjár.**

Postverk Føroya

Sosialurin 341800

# Fútin heldur fram

**Í farnu viku mátti HB standa til svars fyri fútanum, sum vil hava skil upp á arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá útlendskum ítróttafólkum. Sum skilst, so vóru tó eingir trupulleikar hjá føroyameistarunum**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast boðini fyri stuttum vóru frá fútanum, at tað ikki varð gjørt meira við útlendingamálið her og nú, so eru aftur greiðar ábendingar um, at útlendska arbeiðsmegin hjá ítróttafeløgum skal eftirkannast.

Alt byrjaði sum kunnugt við skrivinum frá VÍF umframt onkrari aðrari fráboðan, og úrslitið av hesum varð tá, at VB, Neistin og Stjørnan vórðu kannað, og í hjá VB varð úrslitið, at tey leiktu fleiri dystir uttan at gera nýtslu av útlendsku arbeiðsmegini.

Politiskt er málið eisini viðgjørt, og líkt er nú til, at ítróttarfeløg koma at fáa okkurt slag av sersømdum, soleiðis at partur av pappírsarbeiðinum kann avgreiðast, eftir at fólkini eru komin til landið.

Fríggjadagin visti Útvarpið at siga, at løgreglan hevði sett seg í samband við eitt ítróttafelag í Havn, har váttan skuldi fáast fyri, at ymsu loyvini vóru í rættlag.

Sum vit hava skilt, so er tað HB, sum er biðið um leggja øll skjøl á borðið viðvíkjandi Nico Dugaru. Rumenski miðvallarin hevur annars leikt við føroyameistarunum í tvey ár, og sambært formanninum í HB, Birgir Enghamar, so vóru heldur ikki nakrir trupulleikar við pappírnum her, og í øllum førum hevði HB so ikki hoyrt nakað aftur um málið.

Enn er so ikki staðfest, hvørt talan verður um fleiri feløg, men við Útvarpið segði Bergleif Brimvík, at fær løgreglan illgruna um at viðurskiftini ikki eru í lagi, so verða kanningar gjørdar.



# JÓLASÍÐAN



































